# tni – og vit stuðla íverksetarum

ist væl í føroyska fólkinum.

Kaj Leo Johannesen, løgtingsmaður, helt tó ikki, at íverksetarar leggja so nógv í jantelógina. Tí eru tey íverksetarar, sum hann tók til.

Løgtingsmaðurin helt, at samfelagið eigur at "dyrka" íverksetarar.

– Býrt tú í danskari kommunu og hevur eitt hugskot, renna tey aftan á tær. Einki er ómøguligt. Hetta sært tú ikki í Føroyum, tó kanska eitt sindur í Eysturoy.

Kitty May helt tað vera ótrúligt og ógvuliga flott, sum hon tók til, at vit hóast alt hava so nógvar íverksetarar í Føroyum.

Hon helt, at í framhaldsskúlum átti tað at verið líka so viðkomandi, at næmingarnir duga at gera eina íløguætlan sum tað at duga geografi.

## Stuðul til uppstart

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, helt, at kommunum eigur at verða heimilað at veita íverksetarum ein "uppstart" – og bara ein uppstart, sum hann tók til.

– Í dag hava vit ikki heimild til nakað sum helst, sum líkist hesum, og neyðugt er at broyta kommunulógina, um slíkt skal gerast, segði hann.

Løgmaður var samdur við Rodmundi og helt hugskotið um stuðul til ígongdsetan vera gott.

Oddbjørg Højgaard, sum eisini er í strategibólkinum, helt, at samstarvið millum vinnulívið og myndugleikarnar er ov vánaligt.

Gissur Patursson er eisini við í strategibólkinum, og hann var samdur við Oddbjørg.

Gissur helt fyri, at eingin politikari hevur gjørt sær greitt, hvussu høgar forðingarnar hjá íverksetarum í veruleikanum eru.

– Sum vinnurekandi helt eg, at mvg'ið var nakað volapyk, tá ið tað kom. Hví skuldu vit gjalda mvg, tá ið vit kortini skuldu fáa tað aftur, spurdi Oddbjørg.

Hon helt, at ein íverksetari náttúrliga setir sær spurningin, hví viðkomandi er íverksetari, tá ið hann ella hon ikki duga toll-og mvg-lógir.

– Tað má vera soleiðis, at íverksetarar, sum biðja um hjálp, fáa ta hjálp, teir hava fyri neyðini, segði Oddbjørg Højgaard, sum í sínari tíð legði lunnar undir Dekostovuna.

## Savnað ráðgeving

Í framløguni hjá strategibólkinum, segði Kitty May Ellefsen, at íverksetararáðgeving skal savnast á einum staði.

Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, segði seg ivast í, um hetta nú er rætti vegurin at ganga.

– Verður ráðgevingin savnað á einum staði, vita vit, hvar hon kemur at liggja.

Helst hevur Kári hugsað um Sp/f Virkisráðgevingina í Saltangará, tá ið hann setti spurnartekin við miðsavnan.

Hann segði seg ikki dugað at síggja nakað skeivt við, at ráðgevingin "møtir" íverksetaranum úti í økinum.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, segði, at ætlan landsstýrisins er, at Menningarstovan skal verða almenna "snúningspunktið" í hesi ráðgeving, har íverksetarin skal kunna fáa allar teir upplýsingar, sum hann ella hon hevur brúk fyri.

– Men hetta forðar tó ikki øðrum í at veita ráðgeving, legði hann aftrat.

## Ymiskar fyritreytir

Gloria Kalsø, sum eisini er við í strategibólkinum, vísti á, hvussu ymiskt fólk kunnu verða møtt við sínum hugskotum.

– Tað er lættari hjá einum fyrrverandi rokskipara, sum Jóhan Páll Joensen, at fara til ein fíggingarstovn og siga, at hann hevur eitt hugskot - enn tað er hjá einum, sum kemur við sínum "glatta" andliti, sum Gloria tók til.

Hon vísti á, at sama er við einum manni sum Tórbirni Jacobsen, sum hevur røtur í vinnulívi – ella Kaj Leo Johannesen, sum hevði Birgir Danielsen, sála, sum sín lærumeistara.

– Vit eiga at lyfta í felag, so váðin ikki verður so stórur.

Gloria Kalsø segði seg vænta, at onkur føroysk fyritøka fer at tjena rættiliga nógvan pening um eini 10 ár ella so.

– Kanska verður hetta innan KT-vinnu, legði hon aftrat.




*– Vit hava nógvar ymiskar lærarar, og tað vísir seg eisini, at lærarar kunnu brúkast nógvastaðni í samfelagnum. Eg veit ikki, um tú kanst læra til íverksetara – ella um hetta bara er viðføtt, segði Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag. Hann setti eisini spurningin, hvussu læraraútbúgvingin kann tillagast, soleiðis at íverksetanin er við*